UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 3. november 2020
J.Nr.: 19/00507-13
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: ARØ

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 9. februar 2001, løgtingslóg nr. 79 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 46 frá 17. mai 2011, løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012, løgtingslóg nr. 71 frá 22. mai 2015, løgtingslóg nr. 129 frá 20. desember 2016, løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020 og løgtingslóg nr. 43 frá 7. apríl 2020, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 2. Inntøkur stovnsins verða útvegaðar við gjøldum frá teimum, sum taka ímóti A-inntøku, teimum sum rinda A-inntøku, gjøldum frá sjálvstøðugt vinnurekandi og frá persónum, sum hava teknað sjálvbodnar skipanir.	**1.** § 2 verður orðað soleiðis: "**§ 2.** Inntøkur grunsins verða útvegaðar við gjøldum frá: 1) Teimum, sum taka í móti, og teimum, sum rinda: a) A-inntøku. b) Lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Føroyum. c) Lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í

	Norðurlandi, og sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjað í Føroyum. 2) Sjálvstøðugum vinnurekandi, sum hava teknað arbeiðsloysistrygging sbrt. § 12. 3) Persónum, sum hava teknað sjálvbodna arbeiðsloysistrygging sbrt. § 13.”
§ 2 a. Inntøkur og útreiðslur stovnsins verða ikki tiknar við á løgtingsfíggjarlógina.	**2.** Í § 2 a verður “stovnsins” broytt til: “grunsins”.
§ 3. ...	**3.** Í § 3 verður sum stk. 2 sett: “*Stk. 2*. Samsýningin til stýrislimirnar skal góðkennast av landsstýrismanninum.”
§ 7. Gjaldsskyldugir til Arbeiðsloysisskipanina eru 1) allir persónar, sum móttaka A-inntøku og sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, 2) øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum.	**4.** § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Gjaldskyldug til Arbeiðsloysisskipanina eru: 1) allir persónar, sum móttaka inntøku sbrt. § 2, nr. 1, og sum hava fylt 16 ár, men ikki hava nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., og 2) øll, sum rinda inntøkur sbrt. § 2, nr. 1.”
Stk. 2. Persónar, sum eftir løgtingslóg um almannapensjónir fáa hægstu fyritíðarpensjón, verða undantiknir frá gjaldskyldu, sbr. § 8 a.	**5.** § 7, stk. 2 verður orðað soleiðis: “*Stk. 2.* Persónar, sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjaðir í øðrum landi, eru undantiknir frá gjaldskyldu.”
§ 8. Gjaldið til Arbeiðsloysisskipanina, í hesi lóg nevnt ALS-gjaldið, verður roknað av øllum A-inntøkum, sum teir	**6.** § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Gjaldið til Arbeiðsloysisskipanina, í hesi løgtingslóg nevnt ALS-gjaldið, verður roknað av øllum inntøkum, sum

gjaldsskyldugu móttaka ella rinda, tó undantikið: 1) fólka- og fyritíðarpensjón, 2) aðrar skattskyldugar almannaveitingar, umframt aðrar veitingar, sum sambært lóg ikki verða skattaðar sum A-inntøka, undantikið endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3, í forsorgarlógini, 3) A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini og undir FAS-líknandi skipan, sum gevur rætt til afturbering av skatti til reiðaran. 4) Tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, uppihaldspeningur sbrt. hjúnabandslógini og barnapeningur sbrt. "lov om børns retsstilling", sbr. § 8a. *Stk. 2-3.* ...	ásett í § 2, nr. 1, sum tey gjaldskyldugu móttaka ella rinda, tó undantikið: 1) Fólkapensjón og fyritíðarpensjón. 2) Aðrar skattskyldugar almannaveitingar, undantikið: a) Endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3 í forsorgarlógini. b) Ansingarsamsýning fyri at ansa gomlum og óhjálpnum sbrt. § 12 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. c) Sjúkradagpengar sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. 3) A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini og undir FAS-líknandi skipan, sum gevur rætt til afturbering av skatti til reiðaran, um viðkomandi løntakari ikki hevur fastan bústað í Føroyum ella í einum av hinum Norðurlondunum. 4) Tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, uppihaldspeningur sbrt. anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning og barnapeningur sbrt. lov om børns retsstilling."
§ 8 a. Undantøka frá gjaldskyldu eftir § 7, stk. 2, og undantøka eftir § 8, nr. 4, verður veitt eftir umsókn til Arbeiðsloysisskipanina. Undantøkan frá gjaldskylduni tekur við tann dagin, Arbeiðsloysiskipanin hevur fingið skrivliga umsókn um undantøku.	**7.** § 8 a verður strikað.
§ 9. ... *Stk. 2.* ALS-gjaldið fellur til gjaldingar, samstundis sum teir gjaldskyldugu rinda ella móttaka A-inntøku. Um stýrið tekur undir við ásetingunum, kann landsstýrismaðurin í kunngerð seta aðra gjaldsfreist fyri gjaldskyldug sambært § 7, stk. 1, nr. 2. Um stýrið tekur undir við ásetingunum, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta	**8.** § 9, stk. 2, 1. og 2. pkt. verða orðað soleiðis: "ALS-gjaldið fellur til gjaldingar, samstundis sum tey gjaldskyldugu móttaka ella rinda inntøku sbrt. § 2, nr. 1. Um stýrið tekur undir við ásetingunum, kann landsstýrismaðurin í kunngerð seta aðra gjaldsfreist fyri gjaldskyldug sbrt. § 7, stk. 1, nr. 2 og

avgreiðslugjald fyri teir arbeiðsgevarar, sum ynskja at rinda ALS-gjald eftir rokning frá Arbeiðsloysisskipanini. Áðrenn lønin verður útgoldin løntakara, skal inngjaldið til Arbeiðsloysisskipanina avroknast. *Stk. 3-4. ...*	tey, sum taka í móti inntøku sbrt. § 2, nr. 1, litra b og c.”
§ 14. Rætt til arbeiðsloysisstuðul hevur persónur frá tí degi, tá viðkomandi: 1) er arbeiðsleysur og mótvegis Arbeiðsloysisskipanini prógvar, at so er, tó í fyrsta lagi frá tí degi Arbeiðsloysisskipanin hevur móttikið skrivliga umsókn, 2) er tøkur á arbeiðsmarknaðinum og arbeiðsførur at átaka sær eitthvørt fulltíðarstarv, 3) er sinnaður at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum, sbrt. §§ 25-25 b, 4) hevur fylt 16 ár, men ikki 67 ár, 5) hevur bústað í Føroyum og 6) ikki er sjálvstøðugt vinnurekandi sambært § 12, stk. 6. *Stk. 2-4. ...*	**9.** Í § 14, stk. 1, nr. 4 verður “67 ár” broytt til: “nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a.”
§ 15. Útrokningargrundarlagið er móttikna A-inntøkan seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið er staðfest. Upp í útrokningargrundarlagið verður ikki roknað: 1) fólka- og fyritíðarpensjón, 2) aðrar skattskyldugar almannaveitingar undantikið endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3, í forsorgarlógini, 3) A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini, umframt undir FAS-líknandi skipanini, sum gevur rætt til afturbering av skatti til reiðaran og 4) tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, uppihaldspeningur sbrt. hjúnabandslógini og barnapeningur sbrt. lóg um rættindi barnanna, í tann	**10.** § 15, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Útrokningargrundarlagið er móttikna inntøkan sbrt. § 2, nr. 1 seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið er staðfest. Upp í útrokningargrundarlagið verður ikki roknað: 1) Fólkapensjón og fyritíðarpensjón. 2) Aðrar skattskyldugar almannaveitingar, undantikið: a) Endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3 í forsorgarlógini. b) Ansingarsamsýning fyri at ansa gomlum og óhjálpnum sbrt. § 12 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. c) Sjúkradagpengar sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.

mun, nevndu inntøkur eru undantiknar gjaldskyldu sambært § 8a. *Stk. 2-4.* ...	3) A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini og undir FAS-líknandi skipan, sum gevur rætt til afturbering av skatti til reiðaran, um viðkomandi løntakari ikki hevur fastan bústað í Føroyum ella í einum av hinum Norðurlondunum. 4) Tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, uppihaldspeningur sbrt. anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning og barnapeningur sbrt. lov om børns retstilling.”
§ 16. Arbeiðsloysisstuðul pr. dag er 75% av tí í § 15 nevnda útrokningargrundarlagi, býtt við 253. Útgoldið verður fyri allar dagar í árinum við undantaki av leygar-, sunnu-, og halgidøgum. *Stk. 2.* Árligi arbeiðsloysisstuðulin er í mesta lagi kr. 210.000. Frádrigin hesi upphædd verða egnar tænastumannapensjónir, umframt aðrar líknandi eftirlønir, sum verða skattaðar sum A-inntøka, tó ikki fyritíðarpensjónir. Dagligi arbeiðsloysisstuðulin er í mesta lagi hægsti árligi arbeiðsloysisstuðulin, býttur við 253. Arbeiðsloysisstuðulin um tíman er í mesta lagi hægsti dagligi arbeiðsloysisstuðul, býttur við 8. *Stk. 3-4.* ...	**11.** Í § 16, stk. 1, 1. pkt. verður “75%” broytt til: “80%”. **12.** § 16, stk. 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis: “Árligi arbeiðsloysisstuðulin er í mesta lagi kr. 222.000 umframt eftirlønargjaldið sbrt. § 17.”
§ 17. (Strikað).	**13.** § 17 verður orðað soleiðis: “**§ 17**. Arbeiðsleys, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, rinda eftirlønargjald sbrt. eftirlønarlógini.”
§ 24. Arbeiðsloysisskipanin umsitur arbeiðsávísing fyri arbeiðsleys og onnur, sum ynskja at vera skrásett á arbeiðsávísingini. Rætturin til fáa útgoldið stuðul eftir §§ 14 og 21 er treytaður av, at	**14.** Í § 24, stk. 1, 2. pkt. verður “21” broytt til: “25 a”.

viðkomandi er skrásettur í arbeiðsávísingini. Um stýrið tekur undir við ásetingunum, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð, í hvønn mun og undir hvørjum treytum onnur, sum ynskja tað, kunnu verða skrásett í arbeiðsávísingini. *Stk. 2-4.*	
§ 26. Avgerðir, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur tikið viðvíkjandi arbeiðsloysi, kunnu kærast til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Avgerðir hjá kærunevndini kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, men kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt. Freistin hjá Arbeiðsloysisskipanini at skjóta mál inn fyri Føroya Rætt er innan 6 mánaðir eru farnir frá, at Arbeiðsloysisskipanin er kunnað um avgerðina. *Stk. 2-4. ...*	**15.** Í § 26, stk. 1, 1. pkt. verður aftan á "Arbeiðsloysisskipanini" sett: "og Barsilsskipanini".
	16. Aftan á § 27 verður sett: "**§ 27 a.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Arbeiðsloysisskipanini talgilt, og kann áseta nærri reglur um talgilda samskiftið."
§ 29. Um ikki strangari revsing er ásett sambært lóggávu annars, verður hann revsaður við sekt ella hefti, sum sambært hesi lóg gevur skipanini skeivar ella misvísandi upplýsingar. *Stk. 2. ...*	**17.** Í § 29, stk. 1 verður "hefti" broytt til: "fongsul upp til 4 mánaðir".